# Reyði Krossur Føroya

## Ársfrágreiðing 2013

## Samarittar

Aftur í ár hava Reyða Kross Føroya Samarittarnir vaksið um virksemi teirra.

Í 2013 hava samarittarnir verið við til beint undir 40 tiltøk. Hetta eru 10 tiltøk fleiri enn í 2012. So árið hevur hilnast væl. Tey, ið skipa fyri almennum tiltøkum í Føroyum, gerast meira tilvitað um trygdina, tað ber við sær, tá samarittarnir eru við. Vit vænta, at fleiri av nýggju tiltøkunum verða afturvendandi, so tað er at fegnast um.

Samaritbólkurin í RKF varð settur á stovn í 1999. Bólkurin hevur ment seg nógv og vaksið um sítt virksemi. Í ár eru eini 30 virkin sjálvboðin í RKF Samarittunum. Av hesum eru sjey aspirantar. Fimm av aspirantunum byrjaðu í ár. Samarittarnir eru skipaðir við einum leiðara og einum varaleiðara.

Fyri áhaldandi at menna førleikarnar hava RKF Samarittar í mong ár ferðast niður til Danmarkar til størstu vaktina hjá vinarbólkinum í Reyða Krossi í Give, nevniliga Jelling Musikfestival, og so var eisini í 2013.

Í ár komu sjey samarittar úr Reyða Krossi í Give til Føroya á vitjan. Donsku samarittarnir vóru við á vakt á bæði Ólavsøku og á Summarfestivalinum. Tað var ein stórur stuðul at hava so nógv eyka fólk afturat, og hetta lætti nógv um uppgávurnar og ikki minst um tímatalið á vakt hjá hvørjum einstøkum.

Til heiðurs fyri vinarbólkin úr Give skipaðu samarittarnir millum Ólavsøku og Summarfestivalin fyri eini venjing í Klaksvík saman við Norðoya Bjargingarfelag.

Á Ólavsøku høvdu samarittarnir eisini vitjan av einum donskum sjónvarpsliðið frá TV3, ið fylgdi teimum á vakt, eins og tað fylgdi løgregluni og sjúkrabilinum. Úrslitið av upptøkunum bleiv ein sending í sjónvarpsrøðini “Aktionen” á TV3.

Í summar fingu RKF samarittarnir nýggja radioútgerð, ið ger samskifti betri og lættari á vaktunum, og í heyst komu nýggju búnarnir, ið eru sponsoreraðir av Tryggingarfelagnum Føroyar.

Samarittarnir hava tveir Facebook profilar. Tann eina brúka samarittarnir til innanhýsis samskifti í bólkinum. Hin verður nýttur til uttanhýsis samskifti, er opin, og hevur 700 vinir.

Her verður m.a. kunnað alment um, hvørji tiltøk Reyða Kross Samarittarnir eru á, nær hesi eru, og hvussu fólk fáa fatur á samarittunum.

## Fyrstuhjálpar-skeiðvirksemi

Fyrstuhjálparbólkurin hjá RKF hevur í ár havt áleið 12 skeið. Hesi eru býtt yvir almenn skeið, har almenningurin teknar seg til, og privat skeið. Reyði Krossur hevur havt tilgongd av stovnum, sum ynskja skeið frá okkum.

Síðan AED (hjartastartarar) eru komnir ymsa staðni kring landið, hevur eftirspurningurin verið stórur eftir júst hesum skeiðinum.

Prísirnir hjá Reyða Krossi eru kappingarførir við hinar útveitararnar av fyrstuhjálparskeiðum. Men kappingin er hørð á marknaðinum, og tað eru nógv, ið veita skeið í fyrstuhjálp.

Instruktørarnir hjá Reyða Krossi hava annað arbeiðið, so tað er avmarkað, hvat tey undirvísa í dagtímunum og tí hvussu nógv skeið, vit kunnu bjóða privatum arbeiðsplássum og almennum stovnum, ið ynskja skeiðini í dagtímunum.

Sjey fyrstuhjálparinstruktørar eru virknir hjá Reyða Krossi Føroya. Tveir blivu útbúnir í mai/juni í 2013. Fyrstuhjálpin er skipað við einum leiðara.

Reyði Krossur Føroya stuðlar Havnar Bjargingarfelag við einum fyrstuhjálparskeiði um árið (manningin á Rescue Lív og Fjallabjargarar). Hetta samstarv riggar sera væl og er partur av arbeiðinum hjá Reyða Krossi at økja um trygdina í Føroyum.

## Ársins fyrstahjápari

Ársins fyrstahjálpari 2013 gjørdist Kjartan Højgaard.

Frágreiðing: ein bilførari er so óheppin, tá hann kemur koyrandi frá Runavík til Toftir, og okkurt óvæntað kemur á vegin, at missa tamarhaldið á bilinum, so hann fer upp um bilverjuna í Saltnesi og endar á sjónum.

Kjartan Højgaard sær tilburðin og rennir aftaná bilinum, sum liggur á sjónum. Ungi bilførarin, sum hevði mist vitið, sat í bilinum og var íbundin trygdarbelti, sum fyrst mátti loysast, áðrenn hann kundi bjargast úr bilinum.

Tað eydnaðist  Kjartani Højgaard at fáa loyst drongin úr trygdarbeltinum, fáa hann upp á grótskráið, og samstundis  taka um bringuna og búkin so sjógvurin rennur úr unga bilføraranum. Onnur, sum hava sæð hendingina, koma nú Kjartani til hjálpar.

Reyði Krossur Føroya tilnevnir Kjartan Højgaard Ársins Fyrstahjálpara 2013, tí hann bar sera skjótt av beinanvegin, hann sá bilin fara út av vegnum. Um ikki, Kjartan bar so skjótt av og veitti fyrstuhjálp, er ivasamt, hvør lagnan hevði verið hjá unga bilføraranum.

Jákup Øre bleiv tilnevndur sum nr. 2, meðan Rói Vágslíð Egholm og Ingolf Joensen blivu tilnevndir sum nr. 3.

Hetta er tólvta ferðin, at Reyði Krossur Føroya kjósir Ársins Fyrstahjálpara. Og aftur hesa ferð er tað Tryggingarfelagið Føroyar, ið stuðlar tiltakinum.

Reyði Krossur Føroya tilnevndi fyrstu ferð Ársins Fyrstahjálpara fyri 2001, og síðani hevur hetta verið ein fastur táttur at varpa ljós á týdningin av kropsligu og sálarligu fyrstuhjálp.

## Endurnýtslan

Reyði Krossur Føroya hevur tríggjar endurnýtsluhandlar. Tveir klædna- og lutahandlar, ein í Vági og ein í Havn, og eina bókasølu í Havn.

## RK-endurnýtsluhandilin í Havn

Stórar broytingar eru hendar í ár í Endurnýtsluhandilinum á Bryggjubakka í Havn. Í fleiri ár hava handilsdamurnar havt ynski um størri høli, og í ár bleiv hetta ynski veruleiki.
Beint eftir nýggjár 2013 var farið undir at bróta niður veggin millum handilshølini og fundarhølið í veghæddini. Tá hetta arbeiði var liðugt, fóru sjálvboðin í gongd við at mála, tapetsera og annars gera klárt til at innrætta handilin av nýggjum. Arbeiðið var liðugt í fyrru helvt av mars, og so var farið at fáa klæðir og lutir inn í handilin.

18. mars lat handilin upp aftur í hesum ljósa, innbjóðandi og dupult so stóra hølinum. Stóra tøkk hava tey fólkini uppiborið, sum vóru við at fáa gjørt hetta megnararbeiðið. Nógvir tímar eru nýttir, og alt er sjálvboðið arbeiði.

Klæðini eru skipað í konufólka-, mannfólka- og barnaklæði. Lutir hava eisini fingið meir pláss, og hølið er innrættað soleiðis, at framsýningin av lutunum sæst væl uttanifrá. Eisini er nú møguleiki hjá fólki at royna klæðini. Mest pláss taka konufólkaklæði, og ársuppgerðin vísir eisini, at mest verður selt í hesum bólkinum.

Áhugin fyri at keypa bundin pløgg, helst heimabundið føroyskt, er vaksin nógv.

Ikki bert ferðafólk, men eisini føroyingar spyrja eftir bundnum pløggum, serliga troyggjum, so eitt arbeiði skal óiva gerðast at skaffa til vega hesa vøru.

Gjøgnum árið hava, eins og undanfarin ár, verið evnisvikur, har avís klædnasløg hava fingið gott og sjónligt pláss. Tað vísir seg í flestu førum at rigga væl og er við til økja um søluna.

Í oktober var felags fundur fyri tey, sum vara av handlinum saman við teimum, sum vara av klædnaskiljingini. Tað var ein góður fundur við sera góðari uppmøting.

Á fundinum var kunnað um ymist viðvíkjandi handlinum og klædnaskiljingini.

Síðan var arbeitt í bólkum viðvíkjandi spurninginum um arbeiðsgongdina, frá klæðini koma inn í sekkum, og til tey koma inn í handilin. Nógv góð hugskot komu inn, okkurt er farið í gongd og annað er ávegis.

Ætlanin er at hava tveir fundir um árið: ein um várið fyri handilsfólkið og ein um heystið fyri handil, klædnaskiljing og RK Klædnahjálpina.

Tær, sum vara av handlinum, eru umleið 30 í tali. Handilin hevur ein leiðara, ein varaleiðara og annars er ein, sum varar av hvørjum vikudegi sær.

Í vetur gjørdi Reyði Krossur eitt lýsingarátak at fáa fleiri sjálvboðin til handilin og eydnaðist hetta væl. Átakið gjørdi, at eini 5-6 fleiri sjálvboðin nú eru í handlinum.

Hóast inntøkan fyri 2013 bert er fyri 9 ½ mánað, tí handilin ikki lat upp fyrr enn 18. mars í ár, er úrtøkan hampuliga góð: beint undir 150.000 kr. Altso í miðal umleið 15.000 kr. um mánaðin. Slakasti mánaðin var mars 8.130 kr., og besti mánaðin var oktober 22.350 kr. Arbeitt verður alla tíðina við at betra handilskonseptið og soleiðis betra inntøkuna.

Handilin hevur heimasíðu á Facebook, har sagt verður frá um temavikur, myndir verða lagdar út, tá nýggj vøra kemur í handilin, og viðkomandi lýsingar verða eisini lagdar út har. Beint nú eru uml. 1.300 limir í bólkinum og handilin fær vinarumbønir so at siga hvønn dag.

Endurnýtsluhandilin í Havn er opin fýra dagar um vikuna. Týsdag til fríggjadag frá kl. 13.30 til 17.30. Vanliga eru tvey fólk í handlinum í senn.
Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006.

## RK-endurnýtsluhandilin í Vági

Endurnýtsluhandilin í Vági flutti í januar 2013 í nýggj hølir á sama vegi, har tann fyrri var. Orsøkin til flytingina var ein ov høg húsaleiga á fyrra staðnum og ein høg oljurokning av tí at hesi hølini vóru so illa bjálvað.

Nýggja hølið kostar væl minni, men er tíverri eisini væl minni enn tað fyrra. Hetta hevur ført við sær, at úrvalið í handlinum er minni nú, eins og ikki ber til at prýða vindeyguni sum í fyrru hølunum, ið høvdu stór vindeygu móti vegnum. Nýggja hølið liggur heldur ikki eins væl fyri sum tað fyrra, og hetta meta Reyða Kross handilsdamurnar í Vági hevur ført við sær, at sølan er minkandi í ár í mun til tey bæði fyrru árini.

Í 2013 seldi RK-endurnýtsluhandilin í Vági fyri 28.000 krónur. Hetta eru 12.000 krónur minni enn í 2012, tá sølan var 40.000 kr. Í 2011 tá handilin lat upp í juni, seldu tær fyri 70.000 kr. uppá bert seks mánaðir.

Í løtuni eru eini 14 sjálvbodnar kvinnur, sum virka í sambandi við RK endurnýtsluhandilin í Vági. Handilin hevur ein leiðara og ein varaleiðara.

Handilin er opin fýra dagar um vikuna. Mánadag kl. 14.00 til 17.30, mikudag kl. 14.00 til 17.30, fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00.

Mánadag og mikudag eru 3-4 sjálvbodnar damur í handlinum. Fríggjadag og leygardag eru 1-2 sjálvbodnar í handlinum. Hetta liggur í føstum skema. Tær sjálvbodnu damurnar skilja og strúka eisini klæðir teir dagarnar, handilin er opin.
Sjálvbodnu damurnar keypa sjálvar leypandi, um tað manglar kaffi, te, og wc-pappír. Kvittanin verður løgd í kassan.
Síðani RK endurnýtsluhandilin í Vági lat dyrnar upp á sumri í 2011, hava tað verið somu aktivitetsleiðari og varaleiðari, sum sína millum hava býtt um leiðsluuppgávurnar hesi trý árini. Tað eru eisini tær, sum tóku stig til RK-handilin í Vági í 2011.

Skipað var fyri køkutombola ein leygardag í oktober. Handilsdamurnar bakaðu sjálvar køkurnar. Eisini var RK-Kaffisøla í november. Og vaflur vóru seldar uttan fyri handilin, tá Norrøna sigldi á Vág í vár.

Føst avtala er við Kára Niclasen um at fáa klæðir norður til Havnar.

Um veturin møtast damur hvønn mánadag frá kl. 13.00 til 17.00 í Stóra Pakkhúsi í Vági at binda, og drekka kaffi. Hetta stendur Elisa Holm fyri. Tað, sum verður bundið, verður sent til Rumenia.

## RK- Bókasølan

Nógv vitjaða bókasølan á niðastu hædd í Reyða Kross húsinum í Havn við inngongd frá Vágsbotni er eitt slag av sjálvtøku, har fólk keypa bøkur og gjalda uttan nakað eftirlit.
Í alt eru 11 sjálvboðin fólk knýtt at Bókasøluni hjá Reyða Krossi.

Tríggir mans hava dagliga eyguni eftir Bókasøluni. Teir eru fram við og hyggja, um nakað nýtt er komið, og um neyðugt er, leggja teir nýggjar bøkur fram.

Hvørt mikukvøld millum kl. 17.00 og 19.00 hittast teir og hava opið. Harafturat eru 8 fólk, ið eftir fastari skipan lata upp og læsa morgnar og kvøld. Bókasølan hevur ein leiðara.

Tað gongur væl við søluni. Sølan hevur kvinkað uppeftir øll árini, síðan byrjað varð, men í 2013 var sølan heldur lakari umleið 136.000 kr. Hetta eru eini 14.000 kr. minni enn í 2012, tá

Bókasølan seldi fyri áleið 150.000 kr. Hetta kom av, at Bókasølan var stongd tvær vikur í summar, meðan riggað varð til cafeina. Og í desember var stongt í eina lítla viku, tí hurðin fór av vindi.

Reyða Kross Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis og útreiðslurnar eru nærum ongar, tí munar Bókasølan ógvuliga væl til virksemið hjá Reyða Krossi.

## Landsinnsavningin 2013

Ongantíð hava vit savnað inn so nógvan pening til eina landsinnsavning sum í ár.

Tað komu 833.000 krónur inn til Landsinnsavningina 2013, har sjálvboðin gingu við bússu frá hurð til hurð í øllum landinum. Eisini fingu vit dyggan stuðul frá føroyskum vinnufyritøkum, sum vit settu okkum í samband við. Og vit fingu eisini stuðul frá fleiri av føroysku miðlunum, ið lótu okkum lýsa ókeypis ella við stórum avsláttri. Eins og seinnu árini var møguleiki hjá fólki at flyta pening til landsinnsavningina umvegis okkara innsavningar-nummar 905656 og umvegis heimasíðuna.

Arbeiðið at fyriskipa landsinnsavningina fór longu í gongd tíðliga hetta várið. Í bólkinum fyri landsinnsavningina vóru at byrja við fýra fólk, men nú eru tey fimm í tali. Bólkurin hevði tó ynskt, at fleiri fólk vóru, fyri at bólkurin betri kann røkka øllum uppgávunum og fáa eitt enn betri úrslit.

Bólkurin hevur arbeitt nógv við mannagongdirnar at gera arbeiðið, at býta uppgávurnar út til limirnar og seta dato á soleiðis, at tað frameftir skal vera lættari og smidligari at standa fyri landsinnsavningini.

Úti um landið hava vit nógv trúgv ábyrgdarfólk, sum taka ímóti bússunum til eitt heilt øki, og síðani sjálvi skipa fyri at fáa fólk at ganga við bússum. Hesi gera eitt stórt arbeiði, sum landsinnsavningarbólkurin og nevndin í Reyða Krossi eru sera takksom fyri.

Reyði Krossur Føroya sendi umleið helmingin av innsavnaða peninginum til hjálpararbeiðið fyri ofrini fyri krígnum í Sýria.

Hin helvtin er tøk til bráðfeingis- og neyðhjálp, so Reyði Krossur, beinanvegin ein vanlukka rakar, kann veita hjálp, umframt til sosiala virksemi hjá Reyða Krossi í Føroyum.

## Flutningstænastan

Klædnainnsavningin hevur 10 bingjur, ið standa við FK handlar kring landið. Bingjur eru í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági, Hoyvík, Skopun og á Tvøroyri.
Bingjurnar á meginøkinum verða tømdar hvønn mikudag.
Tey innsavnaðu klæðini verða avskipað í Stiðjagøtu til skiljingar. Sandoy og Suðuroy hava serstakar skipanir. Klæðir hagani koma til Havnar við jøvnum millumbilum.

Umframt innsavning av klæðum, hevur flutningstænastan ábyrgdina av, at innsavnaðu klæðini verða send av landinum.

14 bingjur, 20 fót, fullar av klæðum vórðu sendar avstað í 2013. Í eini 20 fót bingju eru umleið 5 tons av klæðum. Klæðini blivu send til Reyða Kross í Danmark. Hetta eru nógv fleiri bingjur enn undanfarnu árini. Í 2012 blivu sjey bingjur sendar av landinum og fýra í 2011.

Onnur ábyrgdarøki umfata millum annað flutning millum hølini í Stiðjagøtu og Bryggjubakka, ruskkoyring, viðlíkahald av bingjunum kring landið og aðrar fyrifallandi uppgávur.

Við útgangin av 2013 vóru 12 limir í bólkinum. Hetta er nøktandi, men ynskiligt er at fáa nakrar limir afturat. Bólkurin er skipaðar við einum leiðara.

## Klædnaskiljingin

Klæðir vera skild í Stiðjagøtu hvørt mikukvøld og eini 25 sjálvboðin eru knýtt at hesum virkseminum. Klædnaskiljingin er skipað við einum aktivitetsleiðara og einum leiðara fyri hvørjum mikukvøldsbólki.

Klæðini, ið koma inn, verða skild soleiðis, at nakað fer í handilin á Bryggjubakka, og nógv fer til Danmarkar.

Í Danmark verða klæðini frá Reyða Krossi í Føroyum antin seld í Reyða Kross handlum har ella goymd til bráðfeingishjálp at senda til støð, ið verða rakt av neyð og vanlukkum.

Klæðir verða eisini skild at geva føroyskum familjum, ið eru fíggjarliga illa fyri.

Eftir at bingjurnar vóru settar upp í august 2012, er torført at fáa skilt alt, tí so nógv klæðir koma inn hvørja viku.

## Vitjunartænastan

27 sjálvboðin eru í Reyða Kross vitjunartænastuni. Átta av hesum hava tó steðg nú.

Telja vit saman vitjunartímarnar fyri 2013 hava Reyða Kross vitjunarvinirnir vitja í 913 tímar í ár.

Á Boðanesheiminum vitja tríggir vitjunarvinir hjá Reyða Krossi. Tveir menn og ein kvinna. Hetta gongur stak væl. Kvinnan vitjar eina ásetta deild, meðan menninir sleppa at læna bilar á heiminum og koyra túrar við teimum búfólkunum, ið eru so mikið fræg, at hetta ber til, og tað dáma búfólkunum væl.

Á heiminum í Vallalíð hava vit ein mann, sum vitjar fólk, og hann er vorðin fastur gestur, so hann kennir seg sum heima har. Á Láargarði vitja tvær kvinnur fast.

Vitjunartænastan hevur ongan, ið vitjar á Tjarnagarði. Vit hava havt, men tá móttakarin doyði, kom steðgur í.

Allir vitjunarvinirnir savnaðust í Reyða Krossi á Bryggjubakka í mai 2013. Tá komu tvey umboð fyri leiðsluna á demensheiminum í Vallalíð og greiddu frá ymiskum viðurskiftum viðvíkjandi demenssjúku. Eisini kom eitt umboð fyri Heilræði at greiða frá støðuni hjá fólki, ið fáa demenssjúku.

Í jólamánaðinum savnaðust Reyða Kross vitjunarvinirnir aftur og høvdu eitt hugnakvøld við skemti, sangi og annað.

Í desember 2013 skuldi ein grein koma í Gratisavísina um ein vitjunarvin og ein móttakara. Men okkurt mistak hendi, og tí kemur greinin ikki fyrr enn í marsblaðið 2014.

Reyða Kross Vitjunartænastan verður samskipað og leidd av tveimum sjálvbodnum kvinnum.

## RK Klædnahjálpin

Í 2013 byrjaði eitt nýtt sosialt virksemi í Reyða Krossi Føroya - Reyða Kross Klædnahjálpin.

Her veita vit góð barnaklæðir frá klædnaskiljing okkara til familjur í Føroyum, ið eru illa fyri. Reyða Kross Klædnahjálpin er á Bryggjubakka fyrsta leygardagin í hvørjum mánað og eini átta sjálvboðin eru virkin í bólkinum.

RK Klædnahjálpin bleiv sett á stovn, tí Reyði Krossur fekk áheitanir um at skipa fyri eini hjálp til tær barnafamiljur í Føroyum, ið eru ringast fyri. Hetta eru familjur, ið eru raktar av sjúku og/ella ymiskum sosialum trupulleikum.

Tá tiltakið byrjaði í vár var tað Gigni, ið lýsti tiltakið til familjur, ið tey mettu høvdu tørv á klædnahjálpini.

Heilsusjúkrarøktarfrøðingarnir hjá Gigni settu seg í samband við familjur, har tey sóu, at tey fíggjarliga vóru illa fyri og ikki kundu veita børnunum somu góðu klæðir, sum børn í Føroyum annars vanliga hava.

Hesin leisturin at skipa Klædnahjálpina bleiv eftirmettur aftaná eini tríggjar mánaðir av teim sjálvbodnu í bólkinum og umboði fyri Gigna. Úrslitið av eftirmetingini var, at tað var sjónligt, at vit hava familjur í Føroyum, ið hava tørv á hjálp av hesum slagi, og at Klædnahjálpin kann gera stóran mun, men at úrslitið væntandi kundi blíva betri, um Reyði Krossur sjálvur lýsti tiltakið.

Tað hava vit nú gjørt gjøgnum ymiskar heimasíður og facebookbólkar tær seinnu ferðirnar í ár. Úrslitið er, at vit nú hava fult hús á Bryggjubakka teir leygardagarnar, tá tiltakið er. Tey sjálvbodnu í RK Klædnahjálpini tosa við fólkini, ið koma higar, fyri at fáa eina vitan um teirra støðu og fyri at kanna, um vit kunnu gera nakað betri ella kanska ørvísi.

Reyða Kross Klædnahjálpin bjóðar eisini Herberginum at fáa góð klæðir til teirra brúkarar, eins og vit hava samskifti við Kvinnuhúsið og hava bjóðað teimum at fáa bráðfeingispakkar við klæðum bæði til vaksin og børn, um onkur av teirra brúkarum fær tørv á hesum.

Reyða Kross Klædnahjálpin er skipað við einum leiðara og tveimum varaleiðarum.

## ReyðaKrossKaféin summarið 2013

Frá 19. juni til 3. august var kafé í kjallarahølinum á Bryggjubakka. Kaféin var beint út til Vágsbotn. Eini 30 ung fólk, tey flestu lesandi, arbeiddu sjálvboðin við í hesum nýggja Reyða Kross tiltakinum.
Arbeiðið at fyrireika kaféina byrjaði fyri nøkur teirra longu í mars og fleiri brúktu næstan alla summarferiuna uppá kaféarbeiðið í Reyða Krossi.

Hugskotið við ReyðaKrossKaféini var at skapa eitt hugnaligt stað, sum kundi rúma ungum og gomlum, foreldrum og børnum teirra, teimum, sum bara vildu njóta ein góðan kaffimunn og teimum, sum komu fyri at hitta onnur.

Fokus varð sett á vistfrøði. Hetta var við hugsanini um, at umhvørvið er grundarsteinurin undir okkara vælveru, og at umhvørvisdálking rakar fyrst tey, ið eru ringast fyri, tey sum frammanundan berjast fyri at yvirliva. Umhvørvi og fátækradømi eru tí tætt knýtt. Við at bjóða kundunum vistfrøðiligar og fairtrade vørur, var tað vónin hjá teim ungu í Reyða Krossi at vísa á, at vit sum endabrúkarar hava ávirkan á umhvørvið og fátækradømið í heiminum.

Í tráð vid hesa fatan og andanum í Reyða Krossi Føroya valdu tey ungu sjálvbodnu í ReyðaKrossKaféini at seta kostnaðarstøðið so lágt sum gjørligt, fyri at eisini tey, sum ikki eru so væl fyri fíggjarliga, kundu koma á ReyðaKrossKaféina.

Matin á kaféini gjørdu tey ungu sjálvi. Hetta kravdi nógva tíð og orku at virka matin til. ReyðaKrossKaféin fekk nógva góða umtalu, og sølan varð væl hægri enn mett. Veðrið var tó ikki av tí besta allan juli mánað. Hóast hetta gjørdist kundaskarin alsamt størri, og kaféin fekk fleiri dagligar gestir.

Tey ungu skipaðu eisini fyri einkultum tiltøkum í sambandi vid kaféina og hetta hevði positiva ávirkan á søluna.

Tað er fyrstu ferð, Reyði Krossur Føroya hevur roynt eitt slíkt hugskot at hava eina vistfrøðiliga summarkafé, og hetta skal sjálvandi eftirmetast.

Kaféin hevði nógv gott við sær, men tíverri eisini eina negativa ávirkan bæði á hølini og søluna hjá vælvirkandi bókasøluni. Hetta harmast bæði tey ungu og nevndin um. Hugsanin er, at um ReyðaKrossKaféin letur upp aftur, so skal søluhølið hjá Bókasøluni ikki skerjast, og kaféin bert vera í hølunum við síðuna av soleiðis, at bæði bókasølan og ein kafé lið við lið fáa sum best burturúr.

Samanumtikið gav kaféin nógvar ábendingar um, at undirtøka er fyri einum slíkum stað, og at tað er ein positivur pallur hjá Reyða Krossi at koma í samband við ung og eldri í Føroyum, umframt at hetta skapar inntøkur til Reyða Kross. Tað er enn ein opin spurningur, um Reyði Krossur aftur fer at hava ein summarkafé, ið verður rikin av ungum sjálvbodnum.

ReyðaKrossKaféin fekk stuðul frá fleiri fyritøkum og stovnum. Vit eru teimum sera takksom, og hetta hevði als ikki borið til uttan teirra stuðul.

## Loppumarknaður

Í 2013 vóru tveir loppumarknaðir. Ein var í vár og ein í heyst. Inn komu 30.793 kr. tilsamans fyri báðar.

Reyði Krossur fær ikki so nógv inn meira av loppuvørum, nú tað eru so nógvir loppumarknaðir kring landið.

So hetta virksemið hjá okkum er nógv minkað.

## Putlarar

Putlararnir hava 12 fólk, ið sjálvboðið binda fyri Reyða Kross. Putlarabólkurin er skipaður við einum aktivitetsleiðara.

Leiðarin av putlarunum hevur sent teimum uppskriftir við telduposti, eins og hon hevur fingið manualin við visuella identitetinum frá Reyða Krossi í Danmark, so plakatir og annað tilfar kann gerast.

Tey bundnu pløggini kunnu latast inn hjá Reyða Krossi í Havn. Eisini hevur verið tosað um, um bundnu pløggini hjá putlarunum kunnu savnast inn á aðrar hættir, so tað gerst lættari at vera putlari.

## Filateli

Tiltakið Frímerkir byrjaði í 2013 aftaná, at tiltakið Eldri Menn var syndrað í januar sama ár.

Her verða savnað frímerkir, myntir og pengaseðlar. Alt, sum kemur inn, verður skilt og selt á uppboðssølu í Føroyum ella uttanlands. Peningurin fer til virksemið hjá Reyða Krossi Føroya.

Filateliin í Reyða Krossi hevur ikki havt tað stóra virksemi í ár, tí fyrst máttu vit fóta okkum og royna at finna ein leist viðvíkjandi tilfarinum, ið kom inn. Tað hjálpti tó nógv at fáa umleið 100 kilo av brævbjálvum frá Balslev/Bygma. Tíverri hvarv helvtin av hesum brævbjálvum, meðan teir vóru í húsinum á Bryggjubakka.

Hóast omanfyrinevndu trupulleikar eydnaðist tað Reyða Krossi í 2013 at selja innkomin frímerkir, myntir og pengaseðlar fyri umleið 10.000 krónur.

## Arresttænastan

Aftur í ár fingu tey, ið sótu um jólini í Arrestini í Mjørkadali ein jólapakka frá Reyða Krossi Føroya.

Jólini 2013 vóru sjey fólk í varðhaldi, og tí gjørdu vit sjey pakkar.

Í pakkunum vóru tvær nýggjar bøkur, ein posi við góðgæti, mandarinir, ein fløga ( Ólavur Højgaard: In the Twilight), hosur og ein heilsan frá Reyða Krossi. Afturat hesum lótu vit eina

bók á enskum, um so var, at onkur av teimum sjey í varðhaldinum ikki var føroyingur og kanska kundi lesa á enskum.

Reyði Krossur Føroya byrjaði í 2004 at skipa fyri jólapakkum til teirra, ið sita í varðhaldi um jólini, so í ár var 10. ferð, at vit skipaðu fyri hesum tiltaki.

Afturmeldingarnar frá leiðsluni í Arrestini vísa, at tað hevur týdning fyri tey, ið sita í varðhaldinum, at Reyði Krossur Føroya vísur teimum ans.

## Barnadeildin á Landssjúkrahúsinum

Í jólamánaðinum vóru tvey umboð fyri Reyða Kross á Barnadeildini og lótu teimum trettan góðar barnabøkur á føroyskum umframt eina Disney teknirøðsbók á donskum.

Allar bøkurnar vóru í sera góðum standi - næstan sum nýggjar.

Leiðarin av Reyða Kross Bókasøluni hevði funnið fram bøkurnar og goymt hesar, so vit kundu geva Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum tær í jólamánaðinum.

Á Barnadeildini eru tey fegin um okkara áheitan um at geva landssjúkrahúsinum góðar bøkur til børnini. Tað er langt síðani, at tey hava keypt barnabøkur til deildina, so tørvur var á at fáa nýggjar bøkur til børnini.

## Neyðhjálp, bráðfeingishjálp og menningarhjálp

Samlaða upphæddin, ið Reyði Krossur Føroya lat til hjálp uttanlands í 2013, var 1.320.100 krónur. Av hesum komu 200.000 krónur frá Føroya Landsstýrið og 20.000 krónur frá Skótahjálpini, ið bæði ynsktu at senda peningin umvegis Reyða Kross Føroya til bráðfeingisarbeiðið hjá Reyða Krossi á Filipsoyggjunum.

## Neyðhjálp til Sýria

Reyði Krossur Føroya savnaði inn pening til Sýria í 2013, og samanlagt sendu vit 650.000 krónur til ofrini fyri kríggið í Sýria.

IFRC, (International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies)Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Felagskapurin, sendi í ár út appel um at veita hjálp til ofrini, ið eru hart rakt av krígnum.

Reyði Krossur Føroya sendi fyrst 250.000 til appellin frá IFRC og seinni aftaná landsinnsavningina 400.000 kr.

Peningurin frá Reyða Krossi Føroya verður brúktur bæði til neyðhjálp umframt til psykososiala arbeiði hjá Reyða Krossi fyri at hjálpa sýrisku børnunum.

Humanitera hjálpin til Sýria fer til matvørupakkar og reinførispakkar, til tey innanhýsis burturriknu í Sýria, umframt til stuðul til mobilu klinikkirnar og ambulansukoyringarnar hjá SARC (Sýriski- Arabiski Reyði Hálvmáni)og til heilivág og fyrstuhjálparpakkar.

Eini 9 milliónir sýrar hava tørv á humaniterari hjálp, og fleiri staðni er tørvur bæði á mati og heilivági. Støðan er ógvuliga álvarsom. Meira enn tvær milliónir fólk eru flýdd út úr Sýria til grannalondini, meðan eini seks milliónir eru flýggjað innanhýsis í Sýria. Tey eru rikin burtur frá heimum sínum og stríðast hvønn dag fyri at yvirliva.

Nærum helmingurin av ofrunum fyri krígnum eru børn, ið vaksa upp í ræðuleikunum, og tey eru í vanda fyri at fáa álvarsom arr á sálina, og tí royna vit eisini at bøta um støðu teirra við psykososialum virksemi.

## Bráðfeingishjálp til Filipsoyggjarnar

Reyði Krossur Føroya savnaði inn pening til tey neyðstøddu á Filipsoyggjunum eftir ógvusliga ódnin Haiyan herjaði har seint í heyst.

Í alt blivu 320.000 krónur sendar sum bráðfeingishjálp til tey neyðstøddu í Filipsoyggjunum. 200.000 krónur blivu sendar frá Føroya Landsstýri umvegis RKF og 20.000 frá Skótahjálpini, meðan Reyði Krossur Føroya sjálvur sendi 100.000 kr.

Ódnin Haiyan er ein tann ógvusligasta nakrantíð, og fleiri milliónir fólk á Filipsoyggjunum vóru rakt av henni. Nógv teirra stóðu á berum, tí ódnin hevði oyðilagt alt.

Reyði Krossur gav teim neyðstøddu lívbjargandi fyrstuhjálp og reint vatn, mat, teppir, presenningar og heilivág.

Av tí, at infrakervið fleiri staðni var oyðilagt av ódnini, vóru nøkur økir, har tað var sera trupult hjá teim sjálvbodnu Reyða Kross fólkunum á Filipsoyggjunum at fáa bráðfeingishjálpina fram.

## Bráðfeingishjálp til Niger

Reyði Krossur Føroya sendi í ár 250.000 kr. til Niger í sambandi við IFRC-appellin.

Tað er enn stórur tørvur á humaniterari hjálp í landinum.

Niger verður av IFRC mett at vera tað landið í hasum heimspartinum, ið bleiv harðast rakt av føðivørukreppuni í 2012 umframt, at har vóru flóðir, ið oyðiløgdu nógv og raktu nógv fólk, og at landið fekk eini 30.000 flóttarfólk frá Mali.

## Barnalandið í Zimbabwe

Reyði Krossur Føroya hevur eini 25 faddrar, ið hvønn mánað stuðla Barnalandinum í Zimbabwe.

Stuðulin verður brúktur til at tryggja foreldraleysum børnum skúlagongd, mat og klæðir.

Vit sendu í 2013 50.000 krónur til hetta menningararbeiði.

## Vinabýur Kaukasus/Georgien

Reyði Krossur Føroya sendi 20.000 kr. til vinabýarsamstarvið við lokala Reyða Kross í Georgien/Kaukasus.

Landið er enn ógvuliga merkt av borgarakríggi og krígnum við Ruslandi í 2008. Tað eru 230.000 innanhýsis burturrikin flóttarfólk, ið hava stóran tørv á hjálp.

Stuðulin frá Reyða Krossi Føroya gongur til at byggja upp lokaldeildir hjá Reyða Krossi í Kaukasus, so sjálvbodna arbeiði kann styrkjast.

Stuðulin gongur eisini til hjálp at fyrireika fólkið til náttúruvanlukkur - eitt nú jarðskálvtar.

## Palestina PSP Projekt

Í ár sendi Reyði Krossur Føroya 30.000 til psykososiala virksemið í Palestina PSP Projekt.

Tað psykosociala arbeiði hjálpir børnum og foreldrum, ið eru rakt av álvarsomum konkliktum, at fáa arbeitt við teirra traumatisku upplivingum. Hetta verður eitt nú gjørt gjøgnum aktivitetir við øðrum í somu støðu, soleiðis at tey kunnu betra um teirra lívgóðsku. Psykososiala virksemi í hesi verkætlanini gevur børnunum eina betri sosiala fatan, hjálpir teimum við egnum sjálvsáliti og hjálpir soleiðis, at teirra virðing fyri øðrum menniskjum økist.

Í hesum Reyða Kross og Reyða Hálvmána arbeiðinum verður eisini dentur lagdur á at byggja upp og venja eitt størri bereiðskap av dugnaligum sjálvbodnum og fakfólkum, ið kunnu skipa fyri hjálpararbeiðinum og inna psykososiala fyrstuhjálp á staðnum, tá konfliktin rakar.

Hetta bleiv brúkt undir krígnum í Gaza í november 2012.